# Arnhold Vegghamar og ekstrem, psykisk landsløg, málað við blottaðum nervum



LIST

Øssur Johannesen

Eg gloymi ongantíð, tá eg sá ein málning av Arnholdi Vegghamar í Gallerí Skt. Gertrud í Keypmannahavn einaferð mitt í 90'unum.

Málningurin avmyndaði eitt grønt fjall, sera einfaldur, intensur og kraftmikil, ja, hann hevði eina sterka, upprunaliga frummegi og ein gandamátt í sær, sum man sjáldan upplivir. Tann grøni liturin var ræðandi, intensur, hann hevði koyrt hann upp í styrki, so hann var sjálvlýsandi, ja, íbygdur.

Myndin var full av ovurviðkvæmi, líðing, mystikki og galskapi.

Arnhold Vegghamar er ein tann mest ekstremi listamaðurin, vit hava havt í Føroyum. Eingin málar sum hann. Hann minnir rættiliga nógv um Van Gogh, báðir mála við blottaðum nervum og við øgiligum psykiskum intensiteti. Men meðan Van Gogh forgjørdi sær á ungum aldri, so hevur Arnhold Vegghamar megnað at yvirliva.

Arnhold Vegghamar hevur verið psykiskt sjúkur ein stóran part av lívi sínum, paranoia og forfylgilsisvanvid. Mamma hansara, ið eisini var psykiskt sjúk, forgjørdi sær, leyp av bakkanum á Viðareiði og hetta hevur sjálvandi tikið øgiliga hart uppá Arnhold, og hansara líðingar merkjast týðuliga aftur, tá man sær hansara myndir. Hann er meira svakur enn aðrir føroyskir landslagsmálarar. Hetta merkir, at hansara myndir hava eina sterkari nerv  og somuleiðis eina kraftiga, andaliga dimensión. Tær eru psykedeliskar ella tilvitanarvíðkandi. Ongin føroyskur listamaður hevur so stóra ávirkan á mína psyko sum Arnhold Vegghamar.

Tað er so avgjørt ein fyrimunur at vera sinnissjúkur og svakur, tá ið man málar, tí myndirnar blíva meira psykiskar. Hetta er eitt sereyðkenni fyri stóru listina hjá Arnholdi Vegghamar. At vera svakur nýtist ikki at vera nakað negativt, tað merkir bara, at man hevur meira ekstremar kenslur enn fjøldin.

Arnhold Vegghamar býr einsamallur á Viðareiði og høgu og brøttu fjøllini har við øllum grótinum, tann stórfingna náttúran eru m.a. hansara motivevni. Hann er eisini ein meistari at mála brim og sjógv og eg kenni ongan, sum kann mála grønt sum Arnhold Vegghamar, ikki eingang S. J. Mikines.

Arnhold er ein stórur koloristur, litirnir hava íbygdan gandamátt í sær, so teir leypa á og víðka um sansaverðina hjá áskoðaranum og festa seg við stórari kraft. Hann er uttan fyri elituna í føroyskari list og undirmettur er hann, men tað tykist ikki at nerva hann stórvegis. Hann verður næstan aldrin bjóðaður við, tá føroysk list verður sýnd fram uttanlands, og tað líkist erlig talt svartasta ongum.

Listaskálin eigur bert tríggjar av hansara málningum og eg vil hervið nýta høvið til at biða leiðaran í Listasavni Føroya at fara norður á Hotel Norð á Viðareiði at ogna sær eina røð av málningum eftir Arnhold.

Hann hevur eisini fingið eitt syndaliga lítið pláss í bókini hjá Bárði Jákupsson um føroyska list, tvær smáar myndir á eini hálvari síðu. Tað er ikki til at skilja. Tróndur Patursson, Zacharias Heinesen, Amariel Norðoy, ja, sjálvt Kári Svensson hava fingið meiri pláss í bókini hjá Bárði enn Arnhold, og heilt erliga, eingin av teimum kemur upp á knøini á Arnholdi.

Málningar hansara eru broyttir nakað tey seinnu árini. Teir eru blivnir meira mildir og niðurdempaðir og hava tíverri mist nakað av síni upprunaligu gandamegi, ikki tí, hann ger framvegis góðar myndir.

Tummas Jákup Thomsen og eg vóru og vitjaðu hann. Tað var fantastiskt at møta honum, eg gav honum eina fløsku av snapsi og hann bleiv glaður. Tá eg fór norður aftur at gera samrøðuna við hann, var hann blíður og hevði fingið sær kettlingar.

*Nær byrjaði tú at mála, hvat var tað, sum vakti áhugan og hví fórt tú undir at skapa list?*

– Eg byrjaði við akvarel og farvuladu, eg var 20 ára gamal. Eg sá myndir í vindeyganum hjá einum møblaseljara í Klaksvík. Tað vóru landslagsmyndir og tað inspireraði. Í 1958 hevði eg tvær myndir við á ólavsøku og slapp av við tær.

Eg málaði naturalistiskt, litirnir vóru sum teir hjá Steffani Danielsen, okker, blátt og hvítt, men eg visti onki um hann tá. Eg gekk bara á Viðareiði og málaði. Seinni møtti eg honum. Eg sá myndir av honum hjá Andori Eirikstoft, tær vóru spesiellar, sterkar og ítøkiligar. Tær vóru meira enn tað man vanliga sær. Hann dugdi væl at mála hús, hann málaði á bróstinum og klipti myndirnar úr løriftsrulluni tá ið hann málaði. Og so møtti eg honum í Listaskálanum, hann hevði álvarsom og bangin eygu, hann prátaði lítið. Bangin eygu havi eg helst sjálvur havt, leggur Arnhold afturat.

– Mær dámdi eisini væl myndirnar hjá Jógvani Waagstein. Tað vóru so fáar framsýningar tá. Eg visti púrasta onki um list tá, hevði ikki verið á museum. So var eg á listaskeiði í 59 hjá Ingálvi av Reyni, Jack Kampmann og Janusi Kamban, tá fekk eg meira at vita um list. Vit máladu uppstillingar, fruktir og fløskur og so var eisini damumodell.

*Fortel mær um barnaárini, hvussi hevði tú tað sum barn og í skúlanum, og hvussu hetta hevur ávirkað teg sum listamann og menniskja.*

– Eg hevði tað hampuliga gott, hevði góðan hug at tekna í skúlanum, vit lærdu føroyskt og danskt, rokning, geografi og søgu, vit lærdu onki annað.

*Fortel mær um, hvussu tú arbeiðir, hvørjum verður tú inspireraður av og hvat fær teg í gongd við at  mála.*

– Eg verði ikki inspireraður av nøkrum, eg royni bert sjálvur. Tað verður tosað um at fara til Fraklands at hyggja seg um. Eg havi ongastaðni verið, heilsan hevur ikki verið góð. Eg havi sett mær fyri at mála, at royna nakað nýtt, ofta er leti uppií. Men tey veldigu fjøllini her norðuri inspirera meg. Eg plagdi at ganga niðan á Køtlum oman fyri Árnafjør, har ið vártingið hjá norðoyingum varð sett. Har eru nógvir steinir, sum stóðu upp eftir enda. Mær dámdi so øgiliga væl har uppi.

Tað er ikki altíð man veit at byrja við, hvussu ein mynd skal verða. So roynir man seg fram við litum. Viðhvørt veit eg hvat eg skal mála, men ikki altíð. Man roynir at finna út av tingunum og viðhvørt kemur man fram á nakað tilfeldugt, men viðhvørt rakar man onkran lit. Summir brúka bara reinar litir, tað geri eg ikki, men eg brúki millumlitir, eg brúki sjáldan svart. Renoiar brúkti myrkagrønt so tað næstan var svart. Hann var ein veldigur málari í litum. Hann var kringur at mála kvinnur og børn, hann havi eg sæð upp til sum málari, og Cezanne, fastur í forminum, tað sat væl hjá honum. Tað er so nógv at taka til av málarum, allar hesar bøkurnar, teir koma úr so stórum londum. Tað er so stór fólkamongd og summir blíva til geni. Kinesisk og japansk list hevur ikki mín áhuga.

Á múlalandinum norðast á Borðoynni, har er høgt og óhugnaligt – havhestabjørg. Hatta er deyðans landslag,  segði ein vinmaður hjá mær um Kirkjubøreyn, mær dámdi so væl har.

Tá eg var til skips í Grønlandi og Íslandi, landslagið har virkaði óhugnaligt psykiskt, nakað við deyðan at gera, tað var so høgt, kluftir vóru so svartar og djúpar og alt grótið. Nú dámar mær so øgiliga væl grót, góð motiv, men tá virkaði tað so óhugnaligt, so man kann broytast. Vit hava ongar skógir, ístaðin hava vit fjøll og bjørg.

Tummas Arge málaði eisini grót, men hann hevur inspirerað meg. Eg havi prátað við hann stutt á ólavsøkuframsýningini, tað var bara góðan dag og so ikki meira. Hann doyði so ungur. Lomviga- og lundalondini hjá honum vóru góð.

*Hvat er list, hvat skal til fyri at skapa stóra list, hvat skal stór list innihalda?*

– Ja, hatta er spurningurin, man skal duga. Tað er langt á mál. Man skal ikki vera ráðis-





*Framhald á næstu síðu*